# Spælt gittara í 10 ár

**Maiken Háberg Hansen er ein av fáu kvinnuligu tónleikarunum, sum luttekur á Prix Føroyum í ár. Hon spælir gittara í bólkinum Crashwave, sum leygarkvøldið, ikki megnaði at sleppa víðari. Maiken hevur spælt gittara í yvir 10 ár, og heldur hon, at konufólk eiga at liggja framvið fyri at sleppa at spæla í einum bólki**

KVINNUUMBOÐAN
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg eri von at spæla saman við mannfólki, og havi gjørt tað í fleiri ár, sigur Maiken Háberg Hansen, sum er ein av fáu konufólkunum, sum luttaka á Prix Føroyum í ár. Maiken hevur sjálv spælt gittara í 10-11 ár, og heldur hon, at Prixið er alt ov mansdominerandi.

– Eg veit ikki, hví tað er soleiðis, men tað er í øllum førum ikki tí konufólk eru minni musikalsk enn mannfólk. Tað er keðiligt, at tað ikki broytist upp ígjøgnum tíðirnar, soleiðis at vit fáa meira konufólk við, heldur Maiken.

Bólkurin, sum Maiken spælir við eitur Crashwave, og spælir hon har bæði akkustiskan og elektriskan gittar.

– Tað er stutt síðani eg yvirhøvur byrjaði at spæla akkustiskan gittar. Eini tvey ár síðani ella so. Mær hevur altíð dámað betri tann elekstriska, tí har kanst tú gera meira við effektum og so víðari.

### Lata eyguni upp

Maiken heldur, at tað er harmiligt, at ikki fleiri konufólk eru við. Hennara boð er, at konufólk eiga, at liggja framvið fyri at sleppa at spæla í bólkum, og mannfólkini eiga at lata eyguni upp fyri hinum 50%.

– Kanska man kundi stovnað eitt kvinnuligt tónleikafelag, men eg gangi inn fyri javnstøðu, ikki serstøðu, sigur Maiken, sum leggur afturat, at sjálvt um konufólk sum oftast spæla tvørfloytu, horn, klaver og so framvegis, so eru hetta ljóðføri, ið væl kunnu brúkast í rokki

– Alt kann brúkast í rokki í dag, sigur Maiken.

– Teir í bólkinum eru eisini stoltir av at hava meg sum gittarspælara. Men gentur mugu eggjast meira.

Crashwave slapp ikki víðari í Prix Føroyum, men heldur Maiken, at tað gekk heilt væl at spæla.

– Tað gekk ok, ikki super, men fínt. Sjálv kundi eg gjørt okkurt betri, men soleiðis er tað jú altíð, sigur Maiken at enda.



*Maiken Háberg Hansen er higartil einasti kvinnuligi gittarspælar, sum hevur staðið á palli til Prix Føroyar í Mentanarhúsinum í Fuglafirði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Musikkskúlastjóri lýddi á

Martin Mouritsen, leiðari á Musikkskúlanum, var leygarkvøldið at síggja til Prix Føroyar í Fuglafirði.



– Orsøkin til, at eg eri her er, at eg havi ein son, sum spælir trummur í Lawetz, og so havi ein annan son, sum við nøkrum vinmonnum hevði brúk fyri bili til Fuglafirðar, so eg valdi bara at koma við, sigur Martin Mouritsen.

Musikkskúlaleiðarin sigur annars, hann hevur fylgt væl við í Prixnum í ár, men hetta er fyrsta ferðin hann hevur verið og lurtað í Mentanarhúsinum.

– Her er nógv gott spæl inn í millum, og húsið er væl egnað, bæði til hetta slagið av tónleik og til klassiskan tónleik, heldur Martin.

– Hetta er bara í so hart fyri meg, og tí havi eg oyrapproppar tá eg lurti, og tónleikastílurin er kanska nakað eins.

Í oyrunum á Martin skal ein vinnarabólkur svinga væl og duga at selja vøruna. Harafturat skal kompositiónin av løgunum vera væl skrivað og verða fjølbroytt.

# Útvarpsstjórin kom framvið



Tað er Norðurlandahúsið, sum saman við Sjónvarpi Føroya, Útvarpi Føroya og FUT, sum skipar fyri Prix Føroyum.

Nógv verður eisini gjørt burturúr Prixnum í ár. Sum vanligt sendir sjónvarpi eina sending mikukvøldið eftir innleiðandi umfarið, og harafturat, so sendir Útvarp Føroya eisini beinleiðis frá øllum innleiðandi umførunum. Hetta er fyrsta ferðin Útvarpið hevur roynt at senda beinleiðis frá undanumførunum, og er hetta nakað, ið vísir seg at rigga væl.

Leygarkvøldið høvdu útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen og konan, Marjun lagt leiðina framvið Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

– Vit vóru her inni, so eg helt, at vit skulu koma framvið. Hetta er fyrsta ferðin eg eri í Mentanarhúsinum, og eru karmarnir ótrúliga góðir hjá tónleikarunum, og er hetta eitt imponerandi hús, sigur útvarpsstjórin millum annað.

# 1. ferðin til Mentanarhúsið



Hans Olivur Højgaard Joensen, tónleikalærari, var ein av mongu gestunum, sum leygarkvøldið vitjaði til triðja innleiðandi umfar av Prix Føroyum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Hans Olivur er tónleikalærari í Hoydølum, umframt at hann er leiðari av rútmiska kórinum.

– Nú kenni eg nakrar av tónleikarunum, sum eru við í hesum umfarinum, og eg havi ongantíð verið í Mentanarhúsinum fyrr, so eg helt, at hetta var eitt upplagt høvi at koma at síggja húsið og hoyra bólkarnar, sigur Hans Olivur.

# Krit krimaði

Tað vóru fleiri, sum vóru sannførd um, at Krit fór avstað við sigrinum. Men so var, fyri teir og tey, ið dáma hetta slagið av tónleiki, tíverri ikki.

Krit hevði eina frálíka framførslu, har pallshowið var í topp. Ungu mennir spruttaðu av orku, og teir megnaðu at geva áskoðarunum tað, teir vildu hava.

Bólkurin spælir andaligan tónleik í hørðum, tungum rockstíli, sum minnir nógv um tað, sum Korn spælir.



# Kristjan var DJ

Til fyrsta umfarið var tyktiskt tað heilt tilvildarligt, hvør tónleikur varð settur á tá allir bólkarnir vóru farnir av pallinum, og vinnarin skuldi finnast. Hetta vóru tað fleiri, ið fíltust á, og bæði í øðrum umfari og tí, sum júst hevur verið, hava fyriskipararnir fingið sær ein rættiligan DJ.

Hesuferð var tað Kristjan Joensen úr Klaksvík, sum átti tørn. Seinast var tað Ottar í Funningstovu, sum vendi plátum.



Kristjan hevði so til uppgávu at halda lív í áskoðarunum, tá bólkarnir vóru lidnir at spæla og til Jákup Magnussen kom aftur á pallin at kunngera vinnaran. Og tá Bracket høvdu spælt eina løtu, skuldi Kristjan aftur á pallin til tiltakið endaði um fýra tíðina.






*Stuðulin frá áskoðarunum var øgiligur leygardagin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Stórur dagur fyri flogbóltin

**Føroyskur flogbóltur hevur vallað upplivað nakran dag sum leygardagin, tá ein stúgvandi full ítróttarhøll var karmur um steypafinalurnar hjá kvinnum og monnum**

FINALUR
*Heri á Rógvi*

Ein skuldi trúð, at flogbóltur var best umtókta ítróttagreinin í Føroyum. Í øllum førum um tú hyggur eftir uppmøtingini og stemninginum í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin. Føroyskur flogbóltur hevur valla ikki upplivað nakað líknandi síðani stórheitstíðina í áttatiárunum.

Karmarnir rundanum dystirnar leygardagin vóru nakað av tí besta, sum hevur verið at síggja í Føroyum. Fyrireikararnir hava veruliga gjøllað fyriskipað eitt stórfingið tiltak.

Leygardagin var ringt at ímynda sær, at fleiri dystir í bestu deildini í flogbólti verða spældir fyri at kalla tómum hallum.

Kanska einamest við hyggjarunum við skíggjan kring landið fyri eyga var eitt serligt gólv sett á. Flogbólturin hevur tann fyrimunin fram um hondbóltin, at vøllurin er soleiðis til støddar, at í einari høll sum henni á Hálsi ber betur til byggja karmar rundanum.

Eitt tílíkt tiltak hepnast ikki so væl av ongum. Tað eru eyðvitað bæði feløgini og fyrireikararnir í Flogbóltssambandinum, sum eiga heiðurin fyri eitt ógvuliga gott tiltak.

Í mun til undanfarin ár, hevur tiltakið vundið meira upp á seg, og tað klæddi bæði dystum og høll at uppliva eina tílíka hending sum leygardagin.

Tey, ið varða av flogbóltinum, hava sæð skriftina á vegginum og eru farin heilhjartað til verka. Nógv orku verður sett til, men tað eigur at geva seg aftur í síðsta enda, tí eitt tiltak við stórum dekningi sum steypafinalurnar leygardagin vekja eisini áhuga hjá sponsorum.

Tað er í alstóran mun eisini áskoðarunum fyri at takka, at finalurnar hepnaðust so væl, sum tær gjørdu. Líka so gott sum ítróttastríðið á vøllinum var dysturin millum skarararnar av áskoðarum.

Vit bíða í spenningi eftir, hvat tey finna upp á til komandi ár.

### Altjóða dámur

Fyrstidómari til báðar finalurnar var danin Birger Christensen.

– Tað er ikki tann stóri munurin á at døma her og við eitt nú altjóða dystir. Munurin er serliga støðið og ferðin á spælinum, men sum hetta tiltakið er fyriskipað, minnir nógv um altjóða dystir, sigur Birger Christensen, sum leggur afturat, at hann trívdist óføra væl í stemninginum frá høllini.

– Eg kundi hugsað mær, at tað vóru so nógv fólk til steypafinalurnar í Danmark, sigur Birger.

Hann heldur, at støðið hjá monnunum er lutfalsliga eitt sindur hægri enn tað hjá kvinnunum í mun til bestu deildina í Danmark.

– Spælið gerst støðugt betri, sum dysturin líður. Sum heild var støðið gott, og leikararnir hækka eisini støðið, tá teir leggja til merkis, at dømt verður fyri dupultsløgum, sigur Birger Christensen.

Sjálva dómarauppgávuna helt Birger ikki vera so trupla.

– Tað er rímiliga lætt at døma. Mansfinalan verður tøtt við fimm settum, men eg havi roynt hetta so ofta, at tað nervar meg ikki. Tær ábreiðslurnar, sum koma frá leikarum, seti eg hart eftir beinanvegin, og dysturin gjørdist ikki keðiligur fyri meg, sigur Birger.

### Gott produkt

Formaðurin í Flogbóltssambandinum, Niklas Joensen, heldur, at flogbólturin hevur at gott produkt at bjóða, og tað er upp til feløgini at gera tað meira spennandi at koma til dystirnar.

Flogbóltssambandið hevur havt steypafinalur á henda hátt í nøkur ár.

– Hetta er tað einkulta hendingin, ið størst orka og flestir pengar eru nýttir til. Sjálvar fyrireikingarnar hava kostað einar 60.000 krónur, sigur Niklas.

Hann sigur, at teir hava gagnnýtt royndirnar frá árunum frammanundan, og tey eru als ikki bangin fyri at royna nakað nýtt.

– Tað, vit hava roynt, duga vit, og vit royna so at byggja uppá. Bara hetta gólvið er eitt stórt arbeiði at leggja á, men tað ger tað meira spennandi at síggja.

Skulu vit gera flogbóltin betri umtóktan, mugu vit byrja onkrastaðni, og hetta er eitt gott høvi, sum vit vóna fer at eggja til nakað meira, sigur Niklas Joensen.